## DAGSINS MEINING

# Vesturheimurin og Afganistan

Hernaðarliga átakið hjá amerikanska flogvápninum uttan íhald at bumba herstøðirnar og herdeildirnar hjá Talibanstýrinum í Afganistan hevur eftir øllum at dømi givið úrslit. Talebanskir stríðsmenn flýggja nú um háls og herðar frá støðum sínum.

Tað er annars ein sera torgreidd mynd vit fáa av støðuni í landinum eftir at Norðursamgongan við stuðuli frá USA og Bretlandi serstakliga hevur tikið seg fram á ymsu hermótunum og rikið talebanar burtur. Tó sýnist tað at vera rættiliga greitt, at fólkið, sum kendi seg hótt og niðurbundið undir Talebanstýrinum, nú kennir eitt slag av frælsi aftur, tó at hetta als ikki er allur sannleikin.

Tey, sum hava fylgt gongdini í Afganistan og hava sæð og hoyrt, hvussu steinaldarmentanin hjá fundamentalistisku talebanunum hevur niðurbundið eitt heilt fólk, fegnast uttan iva um, at dagarnir hjá hesum stýri eru taldir. Í so máta mugu vit siga, at USA við sínum bumbuálopum hevur rokkið langt, tó at vit á ongan hátt kunnu taka undir við teimum álopum, sum hava rakt ósek sivilfólk.

Støðan er nú tann, at vit í staðin fyri eitt ræðslustýri hava fingið tí í líkist eini anakistiskari støðu í landinum, tó at henda gevur møguleika fyri loysnum. Talebanstýrið sum so mátti fáast av vegnum skuldi nakar glotti síggjast aftur í hesum landi og skuldi terrorhóttanin beinast burt. Vit skulu heldur ikki gloyma, at tess sterkari Talibanstýrið hevði kunnað blivið, slapp tað ótarnað at halda fram, tess stórri hóttan hevði tess ræðu- og steinaldarmentan kunnað verið fyri onnur hóvlig muslimsk lond. Tí er sigurin á taleban ein sigur fyri okkum øll. Men hetta setir so stór krøv til USA og heimin annars um miðvíst at vera við til at tryggja lóg og landaskil og vera við til at byggja landið uppaftur.

Tí eigur Vesturheimurin saman við muslimsku londunum at rætta Afganistan eina hond og brúka alla hugsandi orku til at hjálpa fólkinum uppá føtur aftur. Alt má gerast fyri at forða fyri, at t.d. Norðursamgongan sleppur at misbrúka sína støðu. Her átti tó at verið vón í tí leiðara, sum Norðursamgongan hevur sett sum sín uttanríkisráðharra. Tey,ið hava fylgt við í BBC og CNN í seinastuni, hava hoyrt og sæð henda rættiliga skilagóða og demokratiskt sinnnaða leiðaran hjá Norðursamgonguni.

Nú er so upp til USA og tess sameindu at liva upp til sín ábyrgd. Eisini Europa og vit í Føroyum eiga at vera tilreiðar at rætta eina hjálpandi hond, nú vit øll hava upplivað syndarligu lagnuna hjá afganum nærum hvønn dag á sjónvarpsskíggjanum. Hetta hevur togað í okkara hjartarøtur og eigur tí at vera ein góð motivatión at vera við til at stuðla har stuðlast kann. Vónandi kann hetta hava við sær eina móming og seming millum muslimar og aðrar religiónir. Bert við at betra umstøðurnar hjá afganum og øðrum fólkum, sum líða neyð og eru undir ófrælsi, ber til at fáa endaliga bilbukt við terrorkreftirnar. Megna vit at byggja Afganistan uppaftur eru vit komin eitt týðandi stig viðari í so máta.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Reyðir loysingarmenn

**Bjarti Thomsen**
*Aberdeen*

Á middegi 6. november hevði útvarpið samrøðu við umboð tjóðveldisfloksins í samband við uppstilling til fólkatingsvalið. Millum annað tók hann til: „Røddin hjá Føroysku tjóðini« og „Til frama fyri alt tað Føroyska fólkið«.

Eg vil hervið gera púra greitt, at tjóðveldisflokkurin ikki umboðar meg - og so langt frá - og heldur ikki arbeiðir til frama fyri framtíð míni.

Tvær høvuðsorsøkir eru til hetta: Hesin flokkur vil slíta tað Føroyska samfelagið upp við rót, uttan at hugsa um avleiðingarnar. Eg eri fullvísur í, at Føroyar eru nógv tryggari og hava nógv fleiri møguleikar innanfyri ríkisfelagsskapin. Eisini hava vit allar møguleikar at skipa okkum, so sum vit vilja, innanfyri felagsskapin.

Hin orsøkin er, at tjóðveldisflokkurin er uttast til vinstru, meðan eg taki undir við politikki frá miðjuni og út til høgru. Hvussu kunnu menn, sum eru fløskaðir upp við alreyðum kommunistiskum hugsjónum, nakrantíð blíva ein borgan fyri einum frælsum Føroyum?

Eg heiti inniliga á allar landsmenn um at fyribyrgja at lopið verður framav í ovfarakæti – og tað gerst best við at velja Sambandsflokkin.

Vónandi kann eg koma heimaftur til eitt land, sum framvegis hevur nógv at bjóða mær.

PS. Eigur útvarpið ikki annað tilfar at leggja á internetið, enn gamlar sendingar um tjóðveldislandsstýrsimenn, sum leggja frá sær.

# Samgongan lagt eyka milliardir á vinnulívið

**Frank Davidsen**

Við at hækka fíggjarlógina útvið 1 milliard, verður neyðugt at hækka útflutningsvirðið við fleiri mia.

Harafturat hevur sjálvstýrissamgongan í einum sonnum sjálvstýrisrúsi, ið ikki stendur nógv aftan fyri »harakiri« sjálvmorðini hjá japanarum, skarvað 356 milliónir av blokkinum.

Alt Føroya fólk er vitandi um, at samstundis sum samgongan sjálvboðin hevur skert blokkin, tó ikki fyrr enn teir sjálvir hava stungið í sekkin, so hava somu menn, uttan at skammast, hesi skjótt 4 árini tikið ímóti 4 milliardum úr danska statskassanum.

Samstundis reypa samgongumenn um, at teir hava lagt til síðis 1,6 mia. hesi 4 árini, men hvørt smábarn kann avdúka teirra glantrileik, tí hvar hevði teirra uppsparing verið, um teir ikki hesi 4 árini skammleysir høvdu tikið ímóti 4 mia. frá dønum.

Taka vit so tær 1,6 mia. og mótrokna tær frá teimum 4 mia., so hevði føroyski landskassin havt eitt risaundirskot uppá 2400 milliónir. Tær 356 mió., sum samgongan metir, at kkara sjúkra-, heilsu- og skúlaverk væl kunnu vera fyriuttan, má okkara vinnulívið vera ein blóða fyri eini fleirfaldan av útflutningsvirðinum. So um vinnulívið ikki livir upp til tey krøv, ið sitandi samgonga setir teimum, m.a. orsakað av einum hóttafalli í okkara útflutningsvinnu, ja, so er bara skattaborgarin at fara eftir.

Konfrontatiónspolitikkurin vil halda fram, um tjóðveldis- og fólkaflokkurin fáa umboð vald á fólkating.

Javnaðarflokkurin er besti garantur fyri samstarvi og loysnum. Farið tí mannsterk á val og setið eitt javnaðarumboð á fólkating.

# Tíðindaskriv

Sosialurin hevur í blaðnum í morgin eina forsíðugrein, sum sigur, at Høgni Hoydal ætlar sær báðar sessirnar – bæði í landsstýri og á fólkatingi.

Hetta er ikki so. Onkur misskiljing man vera íkomin. Undirritaði hevur ta støðu, at um so skuldi verðið, at eg varð valdur, so hevði eg hildið eina røðu og síðani latið sessin til næsta mann á lista Tjóðveldisfloksins. Eftir løgtingsvalið veldst alt um, hvørt eg verði valdur og um møguligar komandi samgongur. Har er undirritaði í júst somu støðu, sum aðrir floksformenn.

*Tórshavn, 14. nov. 2001*
**Høgni Hoydal**

# Soleiðis fullu orðini

»Eg fari í øllum førum at møta á Fólkatingi og halda eina setanarrøðu. Um eg so fari at røkja bæði størvini, fáa vit at síggja. Tað velst um arbeiðsbyrðuna í landsstýrinum.«

Soleiðis fullu orðini í samrøðuni millum blaðmannin og varaløgmann, tá spurt varð, hvat varaløgmaður fór at gera, um hann varð valdur á Fólkating. Og soleiðis varð Høgni Hoydal eisini endurgivin í blaðgrein í Sosialinum tann 15. november.

Blaðmaðurin hevur ikki aðra viðmerking til tíðindaskrivið frá Høgna Hoydal enn ta, at tað, sum skrivað er, er rætt, eftir sum orðini fullu í samrøðuni.

**Edvard Joensen**
**blaðmaður**


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Hvaðar gongur leiðin?

**Gunnar K Nattestad**

Okkara samfelag stendur fyri stórum broytingum, ið koma at ávirka øll okkara viðurskifti. Vit skula velja hvørja ríkisrættarliga støðu okkara land skal virka undir, ein møgulig oljuvinna dagar í havsbrúnni, og á so mangan annan hátt bjóðar dagligi dagurin okkum broytingar. Vit broytast eisini sjálvi og síggja at tað gera onnur eisini, bæði í sinn og skinn.

Soleiðis hevur meira og minni ótryggleika. ALT BROYTIST - ALT? Er so einki sum vit kunna halda í og vita okkum trygg við. Kann tað sum var gott í gjár, vera ónt í dag, ella tað sum er ónt í dag, vera gott í morgin? Um so er, hava vit veruliga grund til at óttast, tí tá er munurin millum ónt og gott, bara ein spurningur um hvørji tíð vit liva í.

Hettar kann skapa meira og minni ótryggleika. ALT BROYTIST - ALT? Er so einki sum vit kunna halda í og vita okkum trygg við. Kann tað sum var gott í gjár, vera ónt í dag, ella tað sum er ónt í dag, vera gott í morgin? Um so er, hava vit veruliga grund til at óttast, tí tá er munurin millum ónt og gott, bara ein spurningur um hvørji tíð vit liva í.

So er bara eftir at spyrja, hvat trýrt tú? Er moralurin hjá tær bara nakað sum er grundað á uppvøkstur og annars meira ella minni tilvildarlig ting. Kanska á ein innara Guð, egnan vísdóm og argumentir - "Humanismu". Humanisman hevur bara ein stóran veikleika - menniskja!

Men tíbetur tað er ikki so. Tað eru ting ið ikki broytast, umstøður og "innstøður" tiknar við. Bíblian sigur at: "Jesus er í gjár, í dag og til ævigar tíðir hin sami". Hansara orð verða standandi til alla tíð, tá-, nú- og framtíð. Somu orð, sum skaptu hendan heim og alt sum í honum er.

Guð havið lov! Tað er møguligt at standa tryggur, eisini tá skýskravarnir falla. Jesus er svarið og eina Hann er grundvøllurin ið ikki vikast. Trúgv á Hann hvaðar so leiðin gongur.

# Teir siga ósatt vilja!

**Trygvi F. Guttesen**

Vilhelm Johannesen og Thomas Arabo hava aftur valt ósømilig amboð í valstríðnum. Vilhelm segði í útvarpsins valsending, at Sambandsflokkurin vil ongar broytingar gera! Vilhelm sigur beinleiðis ósatt og vil soleiðis ikki fylgja sínum formanni, Jóannesi Eidesgaard, sum sigur at Sambandsflokkurin hevur flutt seg ótrúliga langt.

Sambandsflokkurin ber ikki agg og kann saktans gloyma orðini hjá Vilhelm Johannesen, men skrivingin hjá Thomas Arabo í Sosialinum í dag er vandamikil.

Arabo skrivar at ein atkvøða til Sambandsflokkin band – júst tað samband í ríkinum, sum Javnaðarflokkurin annars sigur seg taka undir við.

Thomas Arabo skrivar eisini, at Javnaðarflokkurin hevur stak góðar royndir frá samstarvi við Tjóðveldisflokkin. Hetta síðsta var óneyðugt at boða frá, tí ivaleyst vita øll hvar Thomas Arabo stendur politiskt í Javnaðarflokkinum, hann sá helst eina samanrenning við Tjóðveldisflokkin.

Nei, Sambandsflokkurin er ein atkvøða fyri status quo í spurninginum um Føroya støðu í ríkisfelagsskapinum. Arabo skrivar eisini um eitt val millum fullveldi og svartasta samband – júst tað samband í ríkinum, sum Javnaðarflokkurin annars sigur seg taka undir við.

Sambandsflokkurin ætlar ikki at leypa frá hesum áliti, og eg havi heldur einki hoyrt um at Javnaðarflokkurin hevur ætlanir um at skáka sær undan gjørdari avtalu.

Men skrivingin hjá Araboð ber boð um nakað annað, og fær hann og hansara bólkur í flokkinum viðrák, ja, so hevur Thomas Arabo veruliga gjørt Javnaðarflokkinum eina dáragerð.

Við teim royndum, Arabo hevur, átti hann at vitað, at tað er eitt mark fyri, hvussu ofta ein flokkur snikkaleysur kann skifta kós.

Saman við Tjóðveldisflokkinum fær Thomas Arabo ongar broytingar innan fyri ríkisfelagsskapin, men saman við Sambandsflokkinum er gjørligt at gera allar tær broytingar, sum 75% av føroyingum ynskja.

Sambandsflokkurin vil gera allar tær stjórnarligu broytingar, sum tæna fólkinum best, heldur enn at gera tær broytingar, sum geva okkum loysing.

Vit hava ikki tann alsk til Tjóðveldisflokkin, sum Thomas Arabo hevur.

# Den nye sundhedspolitik

**Hans Jensen**
*Hvalvík*

Efter et kontrolbesøg på Landssygehusets medisinske afdeling var det mig en glæde at kunne konstatere, at man endelig har skrottet den skvattede socialpædagogiske holdning, at patienterne skal hjælpes for enhver pris.

Standard svar på ethvert seriøst spørgsmål fra den hvidklædte: Hold op med at ryge – så har du ikke mere at spørge om. Halleluja!

Helt fint – jeg forstår bare ikke, de bliver ved at indkalde mig til kontrol, det må da være spild af tid for begge parter.

Da de fleste folk desværre ikke er idealpatienter, ville en grov frasortering af klientellet nok kunne spare en overlægestilling eller to. En henvisning til krematoriet kan man indtale på en telefonsvarer.

**De videre perspektiver**

Efter at have gennemtænkt den nye fremragende, progressive sundhedspolitik initieret af Medicinsk Afd. kan jeg godt se, at her er penge at spare. F.eks.:

– alkoholikere. Stop drinking, babe – så kan vi måske overveje at hjælpe dig.

– idrætsskader. Helt ærlig – det har du selv været ude om. Hold op med at dyrke idræt, så…

– trafikskader. Helt udelukket. Lad være at køre bil – så kan vi måske…

– fedme. Hvem har bedt dig æde over evne. Forget it!

– tandpine. Hold op med at æde slik og børst tænder – så måske…

– veneriske sygdomme. O. K. – hvis du skriver under på at leve i cølibat, så måske…

Når den nye sundhedspolitik slår igennem, og de mange overflødige overlæger er blevet erstattet af mere menneskelige telefonsvarer – og hvis man regner med – et slag på tasken – at 80% af alle sygdomme er selvforskyldte, vil de mange problemer med ventelister og personalemangel inden for sygehusvæsenet være løst.

Med dybeste respekt for medicinsk Afd.'s visionære sundhedspolitik.